| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 15. apríl 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 04/2008 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 15. apríl kl. 16.30 varð eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært teldupsoti frá borgarstjóranum, dagfest 08. apríl 2009 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Skrivari: Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 18/2009 ( J.nr. 2008-0002-0024).**

**Val av føstum nevndum av nýggjum valskeiðið 01. januar 2009 til 31. desember 2012.**

Nývalda býráðið hevur á skipanarfundinum tann 29. desember 2008 undir pkt. 2 valt føstu nevndir býráðsins sambært § 19 í løgtingslóg nr. 44 frá 29. juni 1972 um kommunuval, men sambært § 3, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, sum m.a. umrøðir lutfalsval í sambandi við valbólkar, so skuldi lista D verða tillutað 1 lim í hvørjari av teimum 5 føstu nevndunum sambært "Kommunustýrisskipanini fyri Fuglafjarðar kommunu".

Talan er um nýval av fíggjarnevnd, teknisku nevnd, havnanevnd, mentamálanevnd og sosialu nevnd.

Í hesum sambandi hevur fyrisitingin aftur móttikið skriv frá valbólkinum A+B+K, dagfest 14. apríl 2009 við uppskoti um val av teirra limum í nevndirnar, somuleiðis sum sum mælt verður til at velja varalimir fyri hvønn nevndarlimin sær í føstu nevndirnar, hetta sambært § 28, stk. 2 í kommunulógini.

Annars fyriliggur eisini skriv frá listunum A, B og K, dagfest 28. november 2008 er listasamgonga gjørd millum hesar við tilsamans 6 býráðslimum í samband við vali av formansskapi, føstum nevndum og øðrum nevndum, hetta sambært § 3, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Valbólkurin er umboðaður av:

**Fyri Lista A.**
Dánjal Vang
Jann Toftegaard
Eyðun á Lakjuni

**Lista B.**
Sigurð S. Simonsen

**Lista K.**
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig

- ***Val av fíggjarnevnd:***

Uppskot frá valbólkinum listunum A,B og K um at velja Sigurð S. Simonsen á lista B (borgarstjórin fastur limur og formaður sambært kommunulógina), Kristina Toftegaard Larsen á lista K og Magnus Midjord á lista D.

Uppskot frá valbólkinum um at velja hesar tiltakslimir: Dánjal Vang á lista A fyri Sigurð S. Simonsen og Elisabeth D. Eldevig á lista K fyri Kristinu Toftegaard Larsen.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, fíggjarnevndin tó sambært § 38, stk. 1, pkt. 2. (borgarstjórin saftur limur og formaður).

**Avgerð:**
Uppskotið frá valbólkinum um val av Kristinu Toftegaard Larsen og Magnus Midjord varð samtykt. (9-0). Uppskot frá lista D um at velja Sonna á Horni sum tiltakslim fyri Magnus Midjord varð samtykt. (9-0).

- ***Val av teknisku nevnd:***

Uppskot frá valbólkinum listunum A,B og K um at velja Eyðun á Lakjuni og Jann Toftegaard á lista A sum fastar limir og Dánjal Vang á lista A og Elisabeth D. Eldevig á lista K sum tiltakslimir fyri ávikavist Eyðun og Jann.

Uppskot frá lista lista D um at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Petur Abrahamsen sum tiltakslim.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið frá valbólkinum um val av Eyðuni á Lakjuni og Jann Toftegaard sum fastar limir og Dánjal Vang og Elisabeth D. Eldevig sum tiltakslimir varð samtykt. (9-0). Somuleiðis varð samtykt eftir uppskoti frá lista D um at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Petur Abrahamsen sum tiltakslim. (9-0). Sostatt er nevndin mannað við Eyðuni á Lakjuni, Jann Toftegaard og Sonna á Horni, meðan eykalimir teirra eru ávikavist Dánjal Vang, Elisabeth D. Eldevig og Petur Abrahamsen.

- ***Val av havnanevnd:***

Uppskot frá valbólkinum listunum A,B og K um at velja Dánjal Vang og Eyðun á Lakjuni á lista A sum fastar limir og Kristinu Toftegaard Larsen á lista K og Jann Toftegaard á lista A sum tiltakslimir fyri ávikavist Dánjal og Eyðun.

Uppskot frá lista lista D um at velja Magnus Midjord sum fastan lim og Sonna á Horni sum tiltakslim.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið frá valbólkinum um val av Dánjal Vang og Eyðuni á Lakjuni sum fastar limir og Kristinu Toftegaard Larsen og Jann Toftegaard sum tiltakslimir varð samtykt. (9-0). Somuleiðis varð samtykt eftir uppskoti frá lista D um at velja Magnus Midjord sum fastan lim og Sonna á Horni sum tiltakslim. (9-0). Sostatt er nevndin mannað við Dánjali Vang, Eyðuni á Lakjuni og Magnusi Midjord, meðan eykalimir teirra eru ávikavist Kristina Toftegaard Larsen, Jann Toftegaard og Sonni á Horni.

- ***Val av mentamálanevnd:***

Uppskot frá valbólkinum listunum A,B og K um at velja Kristinu Toftegaard Larsen og Elisabeth D. Eldevig á lista K sum fastar limir og Eyðun á Lakjuni og Dánjal Vang á lista A sum tiltakslimir fyri ávikavist Kristinu og Elisabeth.

Uppskot frá lista lista D um at velja Petur Abrahamsen sum fastan lim og Magnus Midjord sum tiltakslim.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið frá valbólkinum um val av Kristinu Toftegaard Larsen og Elisabeth D. Eldevig sum fastar limir og Dánjal Vang og Eyðuni á Lakjuni sum tiltakslimir limi varð samtykt. (9-0). Somuleiðis varð samtykt eftir uppskoti frá lista D at velja Petur Abrahamsen sum fastan lim og Magnus Midjord sum tiltakslim. (9-0). Sostatt er nevndin mannað við Kristinu T. Larsen, Elisabeth Eldevig og Peturi Abrahamsen, meðan eykalimir teirra eru ávikavist Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Magnus Midjord.

- ***Val av Sosialu nevnd:***

Uppskot frá valbólkinum listunum A,B og K um at velja Elisabeth D. Eldevig á lista K og Jann Toftegaard á lista A sum fastar limir og Kristinu Toftegaard Larsen á lista K og Eyðun á Lakjuni á lista A sum tiltakslimir fyri ávikavist Elisabeth og Jann.

Uppskot frá lista lista D um at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Magnus Midjord sum tiltakslim.

Nevndin skipar seg sjálv sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við formanni og næstformanni.

**Avgerð:**
Uppskotið frá valbólkinum um val av Elisabeth D. Eldevig og Jann Toftegaard sum fastar limir og Kristinu Toftegaard Larsen og Eyðun á Lakjuni sum tiltakslimir varð samtykt. (9-0). Somuleiðis varð samtykt eftir uppskoti frá lista D um at velja Sonna á Horni sum fastan lim og Magnus Midjord sum tiltakslim. (9-0). Sostatt er nevndin mannað við Elisabeth D. Eldevig, Jann Toftegaard og Sonna á Horni, meðan eykalimir teirra eru ávikavist Kristina Toftegaard Larsen, Eyðun á Lakjuni og Magnus Midjord.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.00 .

Dánjal Vang    Jann Toftegaard    Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni    Petur Abrahamsen    Elisabeth D. Eldevig

Sigurð S. Simonsen    Magnus Midjord    Sonni á Horni

// Jákup Frants Larsen